*Í felag fyri teg*

# PEDAGOGBLAÐIÐ

Nr. 4 | Desember 2020 | pedagogfelag.fo



## Námsfrøðin á gólvinum skal raðfestast

## Landsstýrið vil útbúgva fleiri námsfrøðingar

## Arbeiðið á Barnaheiminum er eitt kall

## Spírin skal varðveitast

*Vit ynskja øllum eini gleðilig jól og eitt eydnuberandi nýggjár*

FØROYA PEDAGOG FELAG

**Útgevari**
Føroya Pedagogfelag
Tel. 35 75 76
pedagog@pedagogfelag.fo
www.pedagogfelag.fo

**Lagt til rættis**
Ingolf S. Olsen - PRESS

**Layout**
Grafikmaster
www.grafikmaster.fo
info@grafikmaster.fo

**Prent**
Føroyaprent

**Upplag**
500 eintøk

## UMSITING


**Jógvan Philbrow**
Formaður
jogvan@pedagogfelag.fo


**Birita Hammer Jacobsen**
Umsitingarleiðari
birita@pedagogfelag.fo


**Gudny Benjaminsdóttir**
Bókhaldari
gudny@pedagogfelag.fo


**Bára Sólheim Guttesen**
Málsviðgeri
bara@pedagogfelag.fo

## NEVND


Jógvan Philbrow
Formaður
jogvan@pedagogfelag.fo


Nikkil Heinesen
Næstformaður
nikkil@pedagogfelag.fo


Valborg Hammer
Skrivari
valborg@pedagogfelag.fo


Gunnvá A. Hansen
Nevndarlimur
gunnva@pedagogfelag.fo


Harald Joensen
Nevndarlimur
harald@pedagogfelag.fo

**4** Námsfrøðin á gólvinum skal raðfestast

**11** Landsstýrið vil útbúgva fleiri námsfrøðingar

**15** Arbeiðið á Barnaheiminum er eitt kall

**19** Spírin skal varðveitast







ODDAGREIN

Jógvan Philbrow, formaður, skrivar



# Heiðurin er tykkara

2020 er um at renna út, og vit mugu av sonnum siga, at hetta bleiv eitt ár, sum eingin av okkum hevði kunnað ímyndað sær fyri einum ári síðani.

Ein farsótt tók alt heimssamfelagið av ræði og setti eisini nýggjar treytir og avmarkingar fyri okkara fakøki. Og tit kæru limir hava bæði í arbeiðslívi og heimalívi skulað tillagað tykkum til hesar nýggju umstøðurnar.

Her av fakfelagsskrivstovuni skal ljóða stórt og væl uppiborið rós fyri tey stóru tøk, sum tit hava tikið langt út um tað, ið tit eru sett til. Tit, sum hava verið í sóttarhaldi, annaðhvørt sjálv ella saman við sjúkum borgarum. Tit, sum hava noyðst at broyta tykkara privatlív meira enn onnur fyri at verja tey, tit arbeiða við. Tit, sum hava verið til arbeiðis í fyrstu røð og noyðst at liva við óttanum og hóttanini um, at tit kundu verða smittað við sjúkuni.

Ongin tykkara hevur til fulnar fingið tað rós og tann heiður, sum tit av røttum eiga og hava uppiborið. Tykkara partur hevur ikki ligið eftir.

Ársins seinasti mánaði er meira enn hálvrunnin, men enn er eingin nýggjur sáttmáli komin undir land. Nú er vist, at hann verður jólatrøll, men so vita vit í hvussu er, hvat er fremsta uppgávan at loysa, tá vit stíga inn í nýggja árið.

Kommunuval hevur verið, og politiska landslagið á kommunala økinum er nógv broytt, men kortini er ivasamt, um tað hevur nakrar broytingar við sær við atliti at sáttmálasamráðingunum.

Arbeiðsumstøður fylla nógv, serliga á dagstovnaøkinum, har normeringar veruliga eru komnar á dagskránna í høvuðsstaðarkommununi. Sjálvi hava tey roknað seg fram til, at tað mangla 36 milliónir krónur í á dagstovnaøkinum í Tórshavnar Kommunu bara fyri at røkka upp á eina minimumsnormering á sama stigi sum tann, ið er samtykt í Danmark.

Leingi hava vit verið hildin at vera nøkur grenj, tá vit hava víst á neyðugar ábøtur og broytingar. Vónandi kann samtalan nú fara at snúgva seg um, hvussu vit kunnu tryggja eitt gott og mennandi umhvørvi fyri børnini, heldur enn um, hvørt tað yvirhøvur passar, at tørvur er á betringum.

1. januar 2021 verða eisini broytingar hjá okkara limum, sum arbeiða í landsalmenna geiranum, serliga teimum, ið starvast hjá Almannverkinum. Nýggja lógin um almannatrygd og vælferð (vælferðarlógin) kemur endiliga í gildi og setur nýggjar karmar um arbeiðið á ymisku stovnunum. Aðalreglan er, at borgarin skal setast í miðdepilin. Tað verður spennandi at fylgja við í, hvussu alt hetta fer at broyta tað sosialpedagogiska virkisøkið.

Størsta kommunan í landinum hevur gjørt av, at minstunormeringar skulu vera galdandi. Tað kennist tó eitt sindur løgið at skula fegnast um, at ein kommuna ynskir at koma upp á eitt minstamark. Men eitt slíkt minstamark vil tó merkja, at umstøðurnar hjá tykkum, ið skulu lyfta uppgávuna, eiga at gerast eitt sindur betri frameftir.

Vit vóna, at ætlanirnar vera framskundaðar, og at tað ikki gongur ov lang tíð, áðrenn fíggingin er komin út á stovnarnar.

Vónandi merkir hetta eisini, at aðrar kommunur, sum í dag liggja undir tilmælta minstamarkinum, eisini fara at seta nóg mikið av peningi av til at røkka upp á ella helst upp um minstamarkið.

Tá alt annað er sagt, eru tað korini hjá børnunum, ið eiga at liggja kommununum fremst í huga.

Fleiri røddir eru nú frammi um at økja talið av lesandi á námsvísindadeildini. Hesum taka vit heilt og fult undir við, tí verandi tal á lesandi er alt ov lágt. Vit høvdu tó ynskt, at tað eisini bar til at skipa útbúgvingina soleiðis, at tilkomin fólk, ið frammanundan arbeiða á økinum sum hjálparfólk, høvdu sloppið undir fjarlestur ella parttíðarlestur, samstundis sum teirra royndir á økinum eisini kundu komið teimum til góðar.

At vera limur í Føroya Pedagogfelag merkir, at tú ert við til at stuðla undir, at tað námsfrøðiliga virkisøkið framhaldandi verður sett á breddan, og at vit gera okkara besta at ávirka myndugleikarnar at taka tær røttu avgerðirnar tykkara vegna. Vit eru trygdin hjá tær sum einstaklingi – trygdin fyri, at onkur stuðlar tær, um tú hevur tørv á tí.

Við hesum fari eg vegna Pedagogfelagið at ynskja tær og tínum eini gleðilig jól og gott nýggjár.

*– Eg fari so í hvussu er at spenna meg út fyri at fáa økið skipað soleiðis, at tey úti á stovnunum merkja, at tað verða fleiri hendur og fleiri fólk – at tað verður meira orka á gólvinum, har sum á stendur, og at pedagogarnir fáa eina betri fyrireikingartíð, sigur Annfinn Brekkstein, sum á nýggjárinum tekur við sum formaður í mentamálanevndini í Tórshavnar Kommunu*



# Námsfrøðin á gólvinum skal raðfestast

**Eindarleiðslan hevur etið allar uppnormeringar upp. Játtanir og normeringar á dagstovnaøkinum skulu í framtíðini gerast við útgangsstøði í hvørjum stovni sær, og námsfrøðin niðri á gólvinum skal raðfestast. Tað sigur Annfinn Brekkstein, komandi formaður í mentamálanevndini í Tórshavnar Kommunu. Um tvey ár skulu nýggju tíðirnar bæði síggjast og merkjast á dagstovnunum, lovar hann**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Á nýggjárinum tekur Annfinn Brekkstein úr Sambandsflokkinum við sum formaður í mentamálanevndini hjá Tórshavnar býráð, sum varðar av dagstovnaøkinum í kommununi, og hann lovar nýggjar tíðir.

– Vit fóru upp á val við lyftum um uppnormering av dagstovnaøkinum og eldraøkinum, og eg kann siga so mikið, at vit báðir flokkarnir, sum nú hava skipað ein meiriluta í Tórshavnar býráð, eru púra greið yvir, hvat vit fara at arbeiða við – og vit eru eisini samd um, at fyrsti prioritetur hjá mær sum formanni í mentamálanevndini er dagstovnaøkið.

– Eg segði, tá økið bleiv skipað við eindarleiðslum, at eg var ikki nøgdur við tann mátan, sitandi býráðssamgonga gjørdi tað uppá. Eg skal undirstrika, at tað var onki persónligt, sum lá undir míni mótstøðu, men meira tað, at eg helt, at strukturin broyttist til tað verra. Tí tá tú gert eindarleiðslu, verður frástøðan frá gólvinum og upp til tann, sum tekur avgerð í leiðsluni, sera stór – har blivu eini tvey-trý lið. Tað er ongantíð gott, og tað kostar eisini. Tí eru eisini allar uppnormeringar á dagstovnaøkinum etnar upp av eindarleiðsluni, sum eg havi skilt tað, sigur hann.



## Tørvur á gólvinum

Annfinn Brekkstein leggur dent á, at alt tað, hann frættir frá dagstovnunum, bendir á, at tað er á gólvinum, stóri tørvurin er, og at tann trupulleikin ikki á nakran hátt bleiv loystur við eindarleiðsluni. Har skulu onnur amboð til.

– Eg fari so í hvussu er at spenna meg út fyri at sleppa uttan um hatta kjakið, og fáa økið skipað soleiðis, at tey úti á stovnunum merkja, at tað verða fleiri hendur og fleiri fólk – at tað verður meira orka á gólvinum, har sum á stendur, og at pedagogarnir fáa eina betri fyrireikingartíð, sigur hann.

Lyftini hjá komandi formanninum í mentamálnevndini lofta í rættiliga stóran mun atfinningunum, sum Maika Samuelsen, fyrrverandi dagstovnsleiðari, í seinasta Pedagogblaðnum hevði at dagstovnaøkinum í høvuðsstaðarkommununi.

Hon stríddist í níggju ár fyri at fáa eina játtan, sum hon kundi fáa at hanga saman, tí játtanirnar ikki samsvara við veruligu útreiðslurnar – millum annað, tí Tórshavnar Kommuna brúkar miðaltøl fyri alt dagstovnaøkið heldur enn verulig tøl fyri hvønn einstakan stovn, tá játtanin til økið skal býtast út á stovnarnar.

## Samdur í atfinningum

Annfinn Brekkstein sigur, at hann hevur lisið atfinningarnar og skilir tær til fulnar.

Hann vísir eisini sjálvur á, at stovnar, sum eru so hepnir, at teir klára at halda ásetingarnar í dagstovnalógini um, at í minsta lagi tveir triðingar av starvsfólkunum eru útbúnir námsfrøðingar, eru dýrari í rakstri enn stovnar, sum ikki klára at fylgja ásetingunum, men mugu hava lutfalsliga fleiri hjálparfólk í stavi. Tí námsfrøðilig hjálparfólk kosta minni enn námsfrøðingar.

– Atfinningarnar eru púra rættar, og eg eri eitt sindur troyttur av, at man bara brúkar eitt excel-ark fyri at fáa nøkur tøl at passa. Vit mugu hava ein leist, har vit taka útgangsstøði í hvørjum stovni sær, tá pengar skulu játtast. Bæði við atliti at, hvussu normeringarnar skulu vera á stovninum, og eisini við atliti at, hvar hann liggur. Tí ein stovnur, sum liggur í Kaldbak ella á Velbastað



*Annfinn Brekkstein í vakra umhvørvinum uttan fyri frítíðarskúlan Spíran í Havnardali.*
*Mynd: Ingolf S. Olsen*

kann ikki javnsetast við ein, sum liggur mitt í Havnini. Har skulu hvør sínir býtislyklar til, tí kringumstøðurnar eru so ymiskar, at tú kanst ikki koyra alt í ein pott og brúka miðaltøl, sigur Annfinn Brekkstein.

– Og eg taki eisini fult undir við, at játtanin til leiðararnar verður tikin burtur úr normeringini og løgd í eina pulju fyri seg, sum er leys av restini av rakstrarætlanini hjá tí einstaka stovninum, leggur hann afturat.

## Starvsfólk rýma

Hann er ørkymlaður um verandi støðu, har kanningar vísa vaksandi strongd ímillum starvsfólkini á dagstovnaøkinum í Tórshavnar Kommunu, og at alsamt fleiri námsfrøðingar rýma í onnur støtv – eitt nú hjá Almannaverkinum og í fólkaskúlunum.

– Tey rýma, tí gerandisdagurin blívur ov strævin, tí tað fíggjarliga ikki hongur saman á dagstovnaøkinum. Og tí at bygnaðurin – vegurin frá tí einstøku stovuni og upp til leiðsluna, hann er ov langur og knortlutur. Teimum dámar ikki bygnaðin, tey trívast ikki undir honum, og tað merkir, at tey eisini samanumtikið mistrívast, staðfestir Annfinn Brekkstein.

## Eindarleiðsla skinklar

Um bygnaðurin skal rullast aftur og eindarleiðslan takast av aftur, heldur hann tað vera ov tíðliga at taka avgjørda støðu til longu nú – men letur tó lítlan iva vera um, at tað saktans kann koma upp á tal.

– Eg fái ikki enn sagt ítøkiliga, hvat vit fara at gera, men er tað soleiðis, tá vit fara í holt við at fáa dagstovnaøkið á beint, at vit síggja, at her eru nøkur viðurskifti, sum ikki virka, og sum eru í vegin fyri tí, ið vit ætla sum samgonga, so eru vit sjálvandi til reiðar at gera tær neyðugu broytingarnar, sigur hann.

## Fyrsta val

Hann leggur dent á, at tað í fyrsta lagi snýr seg um at hava høvuðsmálið fyri eyga – at tað skal raðfestast meira orka niður á gólvið á dagstovnaøkinum, við øðrum orðum fleiri námsfrøðitímar til hvørt barnið.

– Vit skulu burtur frá at hava so sperdar stovnar, og hesi støðuni, at fólk søkja burtur frá okkum. Tað skal vera øvugt, námsfrøðingar skulu velja kommununa og okkara dagstovnar til; tað skal vera teirra fyrsta val.



– Tað er ikki rætt altíð at fara uppeftir og diktera niðureftir. Tí mugu vit fara inn á stovnarnar at hyggja eftir, hvat tað ítøkiliga er, sum fær námsfrøðingarnar at mistrívast, og so mugu vit lurta eftir teimum og royna at gera har eftir, sigur Annfinn Brekkstein.

## Nógv hjálparfólk

Tað verður nógv gjørt burtur úr, at tað mangla námsfrøðingar, og tað er heldur ikki í samsvari við dagstovnalógina, at meira enn triðja hvørt starvsfólk á fleiri dagstovnum er hjálparfólk. Komandi formaðurin í mentamálanevndini leggur tó dent á, at tað ikki eru hjálparfólkini, sum skulu lastast fyri ta støðuna.

– Eg veit væl, at tað eru nógv óalmindiliga dugnalig hjálparfólk úti á stovnunum, og vóru tey ikki, so var støðan púra vónleys. Men hjá nógvum av hesum ungu og rósku fólkunum er dagstovnurin ofta eitt fyribils arbeiðsstað, áðrenn tey leita sær víðari annaðhvørt at læra ella at lesa. Tí er tað ov nógvur starvsfólkatrafikkur á summum stovnum, og tað hevur ein óstabilitet við sær, bæði fyri børnini og eisini fyri teir námsfrøðingarnar, sum eru – tað verður eitt eyka trýst á tey á gólvinum, sigur Annfinn Brekkstein.

## Meira fakligheit

Tí heldur hann tað eisini vera so sera umráðandi at fáa útbúgvið fleiri námsfrøðingar. Tí hann leggur dent á, at hann ikki bara hevur virðing fyri fakligheitini, men eisini heldur hana vera eina fortreyt fyri at fáa eitt vælvirkandi dagstovnaøki í Tórshavnar Kommunu.



Her vísir Annfinn Brekkstein á sínar royndir, tá hann í síni tíð var borgarstjóri í Kirkjubøar Kommunu, sum umfataði Kirkjubø og Velbastað, men í 2005 var løgd saman við Tórshavnar Kommunu.

Har syrgdi hann fyri – væl áðrenn dagstovnalógin kom í 2000 – at fáa námsfrøðingar inn á bæði dagstovnin, sum varð bygdur á Velbastað fyrst í 1990'unum, og í barnaverndina.

– Sjálvandi skulu vit gera alt fyri at hava nóg mikið av útbúnum námsfrøðingum á dagstovnunum, tí tað er so øgiliga umráðandi, at vit hava sterkar pedagogiskar førleikar úti á stovnunum, og at pedagogarnir trívast og ikki føla seg sperdar. Vit mangla námsfrøðingar, og eg haldi, at nógv skal leggjast fyri at fáa útbúgvið fleiri, eitt nú vit at fleiri verða tikin inn á námsfrøðiútbúgvingina, sigur Annfinn Brekkstein, sum tó vísir á, at tann spurningurin er eitt landsmál, og at hann ikki sjálvur hevur kannað nóg væl, hvat tørvur er á at gera.

– Vit mugu fáa fleiri útbúnar pedagogar, og tí skal tað vera lætt at sleppa í skúla at fáa námsfrøðiútbúgving. Hetta eru ressursur, sum vit mangla, so sjálvandi skulu vit økja um tann kapasitetin, um hann er ov lítil. Men er tað so, at pláss er fyri lesandi, men áhugin er ov lítil til at fylla kapasitetin út, so má okkurt gerast fyri at vaksa um áhugan, sigur hann.

## Stuðlar øllum mátum

Jenis av Rana, landsstýrismaður í mentamálum, sigur í aðrari grein her í blaðnum, at arbeitt verður við

at økja talið á útbúnum námsfrøðingum, men í seinasta blaði vísti hann aftur, at tað kundi koma upp á tal at sleppa at lesa námsfrøði við síðuna av arbeiði sum hjálparfólk. Ein kanning hjá Hjáparfólkaráðnum hjá Pedagogfelagnum hevði nevniliga víst, at nógv hjálparfólk høvdu viljað lisið til námsfrøðing, um tey høvdu kunnað arbeitt samstundis.

Annfinn Brekkstein heldur hinvegin, at tað kundi verið ein fín loysn at loyvt hesum.

– Eg stuðli einum og hvørjum máta at fáa fleiri útbúnar pedagogar uppá. Sum støðan er, mugu vit tora at hugsa út um kassan, tí tað er absolutt neyðugt, sigur hann.

## 36 milliónir krónur

Tað var eitt samt býráð, sum her fyri samtykti fíggjarætlanina fyri 2021, ið var tann seinasta fíggjarætlanin hjá sitandi býráðssamgongu. Í tí sambandinum var ein meting gjørd um, hvat tað kostaði at lyfta alt dagstovnaøkið hjá kommununi upp á eitt nøktandi stig viðvíkjandi normeringum. 36 milliónir krónur er prísurin, segði metingin.

Annfinn Brekkstein sigur, at andstøðan tók undir við fíggjarætlanini, tí hon er sjálv bundin av at arbeiða eftir henni alt næsta ár. Men hann torir ikki at leggja høvdið á blokkin fyri, at tær 36 milliónir krónurnar eru rætta talið.

– Vit eru jú ikki samd við verandi leisti at býta játtanina til dagstovnaøkið út upp á, so vit fara eisini at gera okkara justeringar. Málið er rættiliga komplekst, og eg kann onki neyvt siga, fyrr enn eg veit, hvussu pengarnir fara at verða normeraðir út á hvønn stovnin sær og undir hvørjum grundarlagi, tá vit eru liðug við at gera okkara leist. Men 36 milliónir krónur ljóðar kanska ikki heilt órealistiskt, sigur hann.

## Sjónligir batar um tvey ár

1. januar byrjar so býráðsskeiðið hjá nýggju samgonguni, og síðani hevur hon fýra ár at halda síni lyfti. Um tey so kosta 36 milliónir krónur, eitt sindur minni enn tað, ella kanska eitt sindur meira enn tað.

Annfinn Brekkstein ásannar í hvussu er, at broytingarnar á dagstovnaøkinum ikki kunnu gerast eftir lítlari løtu.

– Eg veit ikki enn, akkurát hvussu vit fara at taka fatur um hetta, tí samgonguskjalið er heldur ikki púra liðugt, tá tað ræður um alt tað ítøkiliga. Og tað verður ikki gjørt eftir einum degi og heldur ikki eftir einum ári. Men um tvey ár, altso í 2022, tá skulu broytingarnar til tað betra á dagstovnaøkinum bæði síggjast og merkjast úti á stovnunum. Tí gera tær ikki tað, so er okkurt galið við okkara leisti at loysa trupulleikarnar upp á.

– Eg vil, og eg ynski, at vit fáa frið á dagstovnaøkinum, at vit fara at seta eina kós, har tað merkist hvønn dag, at tað verður betri, sigur Annfinn Brekkstein, komandi formaður í mentamálanevndini hjá Tórshavnar býráð.

Áðrenn eitt hálvt ár er liðið, ætlar hann at hava vitjað allar dagstovnarnar í Tórshavnar Kommunu.

# LANDSSTÝRIÐ VIL ÚTBÚGVA FLEIRI NÁMSFRØÐINGAR

**Ein heildarætlan skal gerast fyri at økja árliga talið av námsfrøðilesandi, sigur Jenis av Rana, landsstýrismaður. Hann hevur tó ongar ætlanir um við lóg at áseta normeringar á dagstovnaøkinum**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Landsstýrið ætlar at gera nakað við stóra trotið á námsfrøðingum í landinum. Tað sigur Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum. Men tað fer at taka tíð at basa trupulleikanum.

– Samgongan hevur sett sær fyri at eftirmeta námsfrøðingaútbúgvingina, millum annað fyri at økja um talið av útbúnum námsfrøðingum. Uttanríkis- og mentamálaráðið arbeiðir saman við Búskaparráðnum við at fáa gjørt eina greining av útbúgvingartørvinum næstu tíggju árini innan fleiri útbúgvingar; námsfrøði er ein teirra. Tá henda greiningin fyriliggur fyrst í næsta ár, verður ein heildarætlan løgd fyri, hvørji stig skulu takast fyri at økja um árliga talið av námsfrøðilesandi, sigur landsstýrismaðurin.

## Fleiri hundrað mangla

Tað mangla fleiri hundrað námsfrøðingar í Føroyum. Sambært tølum hjá Pedagogfelagnum eru tað umleið 2.000 námsfrøðilig størv í Føroyum, men bara umleið annað hvørt teirra er sett av námsfrøðingum. Restin er hjálparfólk.

Á dagstovnaøkinum eru umleið 1.400 størv. Helvtin ella kanska minni er námsfrøðingar har, sjálvt um dagstovnalógin ásetir, at tveir triðingar av starvsfólkunum á dagstovnaøkinum skulu vera útbúnir námsfrøðingar. So bara fyri at koma upp á tað stigið, sum lógin krevur, mangla tað einir 400 námsfrøðingar á dagstovnaøkinum.

Á serøkinum heldur Pedagogfelagið, at tað mangla ímillum 200 og 250 námsfrøðingar.





*– Vanligt er ikki, at hava lógarásettar normeringar á almennum tænastum og stovnum, og hetta er heldur ikki gjørt innan dagstovnaøkið. Tað eru kommunurnar, sum hava ta rakstrarligu ábyrgdina av dagstovnunum, og sum skipa virksemið. Ætlanin er ikki at broyta hetta, sigur Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum.*

Mynd: Uttanríkis- og mentamálaráðið

Fróðskaparsetrið tekur í løtuni 36 nýggj lesandi inn hvørt ár. Í ár tóku 23 námsfrøðingar prógv á Fróðskaparsetrinum, men afturat teimum verða árliga einir 10 námsfrøðingar útbúnir á donskum útbúgvingarstøðum.

## Fulltíðarstørv bøta um

Jenis av Rana vísir tó á, at stóra talið av parttíðarstørvum á dagstovnaøkinum er við til at vaksa um trotið á námsfrøðingum.

– Meginparturin av námsfrøðingunum á dagstovnunum arbeiðir niðursetta tíð. Umframt at fáa fleiri námsfrøðingar útbúnar árliga, er neyðugt er at seta tiltøk í verk, fyri at fáa námsfrøðingar og onnur starvsfólk at støðast á stovnsøkinum. Um fleiri námsfrøðingar høvdu arbeitt fulla tíð, hevði tað gjørt stóran mun, sigur hann.

Pedagogfelagið hevur fleiri ferðir verið frammi við ynski um, at starvsfólkanormeringarnar á dagstovnaøkinum blivu ásettar við lóg. Bæði fyri at tryggja liviligar arbeiðsumstøður hjá starvsfólkunum og fyri at tryggja eitt gott og námsfrøðiliga nøktandi tilboð, sum er á sama stigi kring alt landið.

## Onki lógarkrav

Men Jenis av Rana hevur tó ongar ætlanir um at fara í Løgtingið við nøkrum lógaruppskoti at áseta normeringarnar.

– Vanligt er ikki, at hava lógarásettar normeringar á almennum tænastum og stovnum, og hetta er heldur ikki gjørt innan dagstovnaøkið. Tað eru kommunurnar, sum hava ta rakstrarligu ábyrgdina av dagstovnunum,



og sum skipa virksemið. Ætlanin er ikki at broyta hetta, sigur hann.

Landsstýrismaðurin vísir á vegleiðandi normeringslykilin, sum kommunurnar skulu halda seg til. Hesin sigur, at vegleiðandi normeringin er tíggju starvsfólkatímar per barn per viku í vøggustovu, seks tímar per barn per viku í barnagarði og tveir til seks tímar per barn per viku í frítíðarskúla, alt eftir hvussu stór skipanin er.

## Dygdin er umráðandi

Tað er tó ein sannroynd, at dagstovnatilboðini kunnu vera rættiliga ymisk frá kommunu til kommunu, tí normeringarnar bara eru vegleiðandi.

Jenis av Rana heldur, at tá dagstovnaøkið er lagt út til kommunurnar at umsita, so eiga hesar eisini at hava møguleika at skipa virksemið, sum tað passar best til teirra viðurskifti.

Men hann vísir samstundis á, at fyri at kommunurnar skulu hava nakað at halda seg til, tá tað ræður um fakliga tilgongd, hevur Mentamálaráðið gjørt Námsfrøðilig stevnumið fyri dagstovnar.

– Tað er umráðandi, at dygd og tilboð eru tryggjað, uttan mun til hvar í landinum tú býrt, tó kann hetta verða gjørt á ymiskan hátt í ymisku kommununum, sigur landsstýrismaðurin.

– Samanumtikið er at siga, at sjálvræði kommununar á økjum, ið eru løgd út til tær at umsita, má virðast. Mentamálaráðið er eftirlitsmyndugleiki og kærustovnur viðvíkjandi innihaldinum og fylgir væl við økinum. Í hesum sambandi kann nevnast, at ráðið ongantíð hevur móttikið kærur frá økinum, sigur hann.

# Arbeiðið á Barnaheiminum er eitt kall

**Gunvør Jonsdóttir ivaðist ikki, tá hon bleiv spurd, um hon vildi vera um eitt koronusjúkt barn á Barnaheiminum. Hon var í avbyrgdum sóttarhaldi í 17 dagar, men hon hevði gjørt tað aftur, um tørvur var á tí. Hon heldur, at summi, ið arbeiða á Barnaheiminum, kanska kenna sær eitt serligt kall, tí fleiri teirra sjálv hava havt okkurt at dragast við í uppvøkstrinum**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Tað er ikki sørt, at Gunvør Jonsdóttir undrast, at tað tað verður gjørt so nógv burtur úr, at hon í august saman við einum starvsfelaga segði ja til vera um eitt barn á Barnaheiminum, sum var vorðið sjúkt av covid-19.

Breddin hjá útvarpinum varpaði ljós á hendingina, og nú er Pedagogblaðið so eisini komið á gátt á bústovninum Argjaboða á Argjum, har hon arbeiðir sum námsfrøðingur í kjallarahæddini. Argjaboði er ein bústovnur hjá Barnaheiminum – ella eind 10, sum tað formliga eitur – og liggur ytst á Argjaboða á Argjum.

## Ein sjálvfylgja

Gunvør undrast, tí hon heldur tað vera nærum sjálvsagt, at hon segði ja, tá hon 10. august bleiv uppringd



*– Eg var ikki beinleiðis bangin fyri at blíva sjúk, men ta fyrstu tíðina ansaði eg øgiliga væl eftir, brúkti til dømis nógv handskar og masku, tá eg var saman við barninum, sigur Gunvør Jonsdóttir, sum í august var í avbyrgdum sóttarhaldi saman við einum koronusjúkum barni á Barnaheiminum.*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

av leiðaranum fyri eindina og spurd, um hon vildi átaka sær at vera



saman við tí sjúka barninum, til tað var vorðið frískt aftur, og kravda sóttarhaldstíðin var runnin. Segði hon ja, skuldi hon byrja dagin eftir, tann 11. august.

– Tað var sjálvandi ikki eitt krav, og eg fekk eisini stundir at hugsa meg um og tosa við familjuna um tað. Tey spurdu eitt sindur í fyrstuni, hví tað akkurát skuldi vera eg og sovorðið. Men tey skiltu tó støðuna og bakkaðu meg hundrað prosent upp. Tí eg helt ikki, at eg kundi siga nei.

– Ongin av okkum feilar nakað, og tað gjørdi tað sjálvandi lættari at taka avgerðina, at vit ikki eru í vandabólki, greiðir Gunvør frá.

Familjan telur mannin Dánjal og døturnar Kristu, sum er 17 ár, og Sólju, sum er 14, og so leingi sóttarhaldið vardi – tey vistu ikki frammanundan, hvussu leingi tað fór at vara – kundu tey bara samskifta við Gunvør um telefon ella teldupost og sosialar miðlar.

## Í handskum og masku

Hon og ein starvsfelagið á Argjaboða, Hans Esbern Fuglø, skiftust um at vera um sjúka barnið, sum bleiv flutt út í frítíðartilboðið í Svanga. Frítíðartilboðið var kortini stongt hetta tíðarskeiðið og til nakað eftir, at barnið var vorðið frískt og flutt heim aftur á Argjaboða.

Tey bæði skiftust um at vera eitt samdøgur í senn saman við sjúka barninum í Svanga og síðani eitt samdøgur í avbyrgdum sóttarhaldi á Hotel Brandan.

– Eg var ikki beinleiðis bangin fyri at blíva sjúk, men ta fyrstu tíðina ansaði eg øgiliga væl eftir, brúkti til dømis nógv handskar og masku, tá eg var saman við barninum. So líðandi fóru vit at kenna okkum tryggari, serliga tí vit blivu kannað fjórða hvønn dag, og tóku tað heila eitt sindur meira avslappað – men vit fylgdu sjálvandi tilmælunum allatíðina. Vit vóru eisini øll frammanundan von við at skula ansa eftir reinførinum, at spritta og sovorðið, tí korona hevði jú herjað í fleiri mánaðir tá, greiðir Gunvør frá.

## Tolið og raskt barn

Hon rósar sjúka barninum fyri at vera ógvuliga tolið og raskt.



*Gunvør uttan fyri búeindina Argjaboða hjá Barnaheiminum, har hon arbeiðir.*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

– Hetta barnið er soleiðis av lyndi, at tí dámar væl at hugsavna seg um til dømis borðspøl og leikur, og tað var helst ein fyrimunur, tá tað skuldi vera so leingi bara saman við okkum. Tíbetur vóru sjúkutekinini rættiliga mild, bara eitt sindur av fepuri, men annars onki at tosa um.

– Vit hugnaðu okkum væl við góðum mati og spølum, og tað var eisini í lagi at fara út um, har ein trampolin var. Vit kundu eisini koyra okkum ein biltúr, um vit høvdu hug til tað, men barninum dámdi eisini væl bara at liggja í heingikoyggjuni og hyggja at teknifilmi, sigur Gunvør.

## Okkurt í viðførinum

Fyri hana var tað, sum nevnt, ein sjálvfylgja at siga ja til at lata seg avbyrgja saman við einum sjúkum persóni. Tað væntar hon, at tey flestu høvdu gjørt, sama hvat umsorganararbeiði talan var um. Men spurd, um námsfrøðingar á serøkinum kanska kenna seg hava eitt serligt kall ella kanska í størri mun enn onnur hava lyndi til at identifisera seg við sínum arbeiði, svarar hon játtandi.

– Øll hava sítt at dragast við, og eg havi varðhuga av, at summi, sum starvast á serøkinum, og kanska



*Maður og børn húsaðust einsamøll í heiminum á Norðasta Horni, meðan Gunvør var í avbyrgdum sóttarhaldi. Tey vóru sjálvand ikki óttaleys um, at hon skuldi búgva saman við koronusjúkum barni í óásetta tíð, men tey stuðlaðu henni væl í avgerðini og allari sóttarhaldstíðini. Úr vinstru eru tað Dánjal Norðberg Jacobsen, Sólja Dánjalsdóttir Jacobsen, Gunvør Jonsdóttir og Krista Dánjalsdóttir Jacobsen.*

*Mynd: Kári við Rættará*

serliga í eind 10, eru fólk, sum ikki altíð hava havt tað so lætt sjálv sum børn. Tey hava ofta okkurt í viðførinum. Tað var kanska eisini eitt sindur turbulent hjá mær. So vil ein so fegin gera mun og velur eitt starv sum hetta – og tú blívur eisini so ógvuliga góð við hesi børnini.

– Tað er eisini soleiðis, at arbeiðið á serøkinum kann vera eitt sindur hart og eisini ógvusligt. Tú skalt ikki vera sart, um tú vilt arbeiða her. Tað er ein partur av tí. Tí hugsi eg, at tá tú fert inn á hetta økið at arbeiða, so fert tú all-in og hugsar í sovorðnum óvæntaðum støðum, at hetta klári eg eisini, sigur Gunvør.

## Hevði gjørt tað aftur

Tíðin í avbyrgdum sóttarhaldi vardi í tilsamans 17 dagar hjá henni, frá 11. Til 28. august. Tá hevði Barnið verið frískt í fimm dagar.

Gunvør er ikki í iva um, at hon eisini hevði sagt ja, um boð aftur vórðu eftir henni at fara í avbyrgt sóttarhald saman við sjúkum búfólki.

– Ja, tað hevði eg, og tað hevði helst eisini verið lættari nú, tí nú vita vit so nógv meira um koronu. Eg skal eisini viðganga, at eg var fegin um, at hetta ikki hendi í fyrstuni, tá korona kom til landið. Tí tá vistu øll so øgiliga lítið, og søgurnar vóru so nógvar. Men nú var hesin tilburðurin í aðru bylgju, og tá var vitanin longu vorðin nógv størri, sigur hon.

# SPÍRIN SKAL VARÐVEITAST

**Annfinn Brekkstein vissar um, at frítíðarskúlin Spírin í Havnardali verður verandi. Helst skuldu tað verið fleiri slíkir stovnar, heldur hann. Fremsta byggiraðfestingin er tó nýggir dagstovnar á Argjum og í Kaldbak**




*Frítíðarskúlin Spírin lat upp í 2005 á leigaðum øki hjá Føroya Ríðingarfelag í Havnardali. Frítíðarskúlin skal verða verandi í Havnardali, lovar Annfinn Brekkstein, sum tó ikki torir at lova nakað um nýbygging.*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Nakað av óvissu hevur valdað um framtíðina hjá náttúrufrítíðarskúlanum Spíranum í Havnardali, sum er partur av frítíðarskúlatilboðnum hjá nýggja Skúlanum á Fløtum í Havn.

Tað hevur ligið í kortunum, at allir frítíðarskúlaárgangirnir fram eftir skuldu halda til í nýggja skúlanum í vesturbýnum, men Annfinn Brekkstein, sum á nýggjárinum tekur við sum formaður í mentamálanevndini hjá Tórshavnar býráð, vissar tó um, at Spírin skal halda fram, har hann er.

– Eg ætli mær bestemt ikki at steingja Spíran. Eg haldi, at sovorðnir náttúrustovnar eru gagnligir fyri nógv børn, og kanska skuldu vit heldur havt fleiri av teimum. Men nú mugu vit finna út av, hvussu vit fara at skipa tað heila, sigur hann.

Tað eru nú nøkur ár síðani, at Spírin søkti Tórshavnar Kommunu um betri karmar. Heitt var á kommununa um sum skjótast at byggja nýggjan frítíðarskúla í Havnardali, tí verandi umstøður eru ov trongar. Spírin heldur til á leigaðum øki hjá Føroya Ríðingarfelag.

## Fyrst Kaldbak og Argir

Men ein nýggjur Spíri ella fyri tann skyld ein annar útidagstovnur verður tó ikki tann fyrsta byggiverkætlanin á dagstovnaøkinum, sum nýggja býráðið fer í holt við, tá tað tekur við á nýggjárinum.

– Nei, tað hevði verið ov popput av mær at lova tað. Vit eru ikki rættiliga liðug við samgonguskjalið og raðfestingarnar har, men vit mugu sum skjótast gera nýggjar dagstovnar á Argjum og í Kaldbak, tí verandi stovnar har eru fullkomiliga ótíðarhóskandi. Tí kann eg siga við rættiliga stórari vissu, at tað verða fremstu raðfestingarnar, sigur Annfinn Brekkstein.

www.pedagogfelag.fo

# VÆLKOMIN

## á námsfrøðiliga arbeiðsøkið!

**Vit í Føroya Pedagogfelag ynskja tær hjartalliga til lukku við nýggja starvinum og, um tú ert í tínum fyrsta starvi, vælkomnum á námsfrøðiliga arbeiðsøkið.**



### Vit arbeiða fyri teg!

Vit arbeiða fyri tína løn og tey arbeiðsviðurskifti, tú ert sett/ur eftir.

### Hollur stuðul

Okkara umsiting vegleiðir teg í øllum ivamálum viðvíkjandi løn og arbeiðsviðurskiftum.

Við yvir 35 ára royndum í samráðingum, professionellari umsiting, og sum stórsta fakfelag á almenna arbeiðsmarknaðinum í Føroyum, er Føroya Pedagogfelag eitt sterkt og fíggjarliga trygt fakfelag at vera limur í.

Limagjaldið er í løtuni 1,8% av grundlønini.

Les meira á pedagogfelag.fo

FØROYA PEDAGOG FELAG

Tak mynd av kotuni við QR-skannara

**Skráset tín limaskap her**